MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Stílað: Fíggjarnevndin
Tinghúsveg 3
100 Tórshavn

Dagfesting: **6. november 2012**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 12/00569-8**

Svar á spurningar frá Fíggjarnevndini, j. nr. Lm.nr. 30/2012 hj/td

Í sambandi við viðgerð av uppskoti til løgtingsfíggjarlóg 2013 ynskir Fíggjarnevndin at fáa svar frá landsstýrismanninum í mentamálum upp á niðanfyri settu spurningar:

Viðmerkjast skal, at spurningarnir eru nógvir og umfatandi og at svartíðin ikki hevur verið serliga long. Tí kunnu møguligar villur og misskiljingar hava sníkt seg inn í svarini.

§ 7 Mentamál

Nevndin ynskir at fáa upplýst, hví landsstýrismaðurin í sínum fíggjarlógaruppaskoti ikki heldur seg til Løgtingssamtyktina Nr.187/2011 um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2013.
Svar: Landsstýrismaðurin hevur í samráð við landstýrismannin í fíggjarmálum og samgonguna hækkað uppskotið til fíggjarlóg fyri grein 7, Mentamál. Serliga hevur tað verið høga talið av lesandi, ið hevur havt við sær, at neyðugt hevur verið at hækka játtanir í mun til játtanarkarmarnar.

Fíggjarnevndin vil fegin hava eina frágreiðing um, hví støðlaðu pengarnir tykjast at vaksa ár um ár ? Hvat ætlar landsstýrismaðurin at gera, so hetta ikki hendir?
Svar: Orsøkin til, at støðlaðu pengarnir til íløgur vaksa, er, at tað hevur tikið longur tíð enn upprunaliga ætlað at fremja ávísar íløgur. Á grein 7 er tað serliga verkætlanin Skúladepil í Marknagili, ið hevur drigið út. Víst verður annars til svar frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum uppá sama spurning.

Nevndin ynskir at fáa eitt yvirlit yvir framskriving fyri allar høvuðskonti, ið landsstýrismaðurin varðar av, við prís- og lønarvøkstri.
Tað er ikki roknað við prís- og lønarvøkstri, hetta má gjaldast innan tillutaða játtan.
Fylgjandi játtanir eru framskrivaðar:

- *7.23.2.01 Fólkaskúlin 2.000.000,- kr*
- *7.23.2.03 Stuðul til fólkaskúlar 500.000,- kr*
- *7.23.3.05 Miðnámsútbúgvingar 7.000.000,- kr*
- *7.23.7.04 Lestrarstuðul 1.072.000,- kr*
- *7.23.7.04 Lestrarlán 143.000,- kr*

11.1.09. Mentamálaráðið (Rakstrarj.)
Víst verður á, at aðalráðið umsitur m.a. dagstovnaøkið. Hvussu verður hetta umsitið? og hvør fíggjarorka er sett av til hetta økið?

Svar: Fyri uml. 2 árum síðan var dagstovnaøkið í ráðnum umskipað frá fulltíðarstarvi í hálvtíðarstarv. Fulltrúin á økinum er í farloyvi í løtuni. Síðan fulltrúin fór í farloyvi, hava onnur starvsfólk í ráðnum røkt starvið.

Lønarjáttanin til MMR er minkað seinastu árini og stendur í stað frá 2012 til 2013 – hóast lønarvøkstur. Fær hetta avleiðingar fyri talið av starvsfólkum?
Svar: Lønarjáttanin var skerd, og starvsfólkatalið var lækkað við 2 ársverkum í 2011. Hildið hevur verið aftur við at seta avloysarar, tá fólk eru farin úr starvi ella í farloyvi. Hetta hevur viðført avlop á lønarjáttanini í Mentamálaráðnum í 2012. Hetta hevur verið óheppið fyri arbeiðið í ráðnum, sum er sera víðfevnt og krevjandi. Tí hava vit nú gjørt av at manna størvini, so at neyðuga arbeiðsorkan verður tøk. Tó verður neyðugt at skipað starvssetanirnar soleiðis at játtanirnar verða hildnar.

23.1.04. Studni (Rakstrarj.)

Játtanin er júst tann sama í 2013 sum í 2012.
Væntast eingin hækking vegna regulering á 0,85% umframt broytingar í tali av lesandi?
Svar:Roknað verður við at klára broytingarnar innanfyri tillutaðu rakstrarjáttan.

Landsstýrismaðurin hevur fráboðað umleggingar av parti av studningi til føroyingar, ið lesa uttanlands, til lán. Eru hesar ætlanir við í tølunum í FLU2013 fyri 2013, 2014 og 2015?
Svar: Mett verður ikki, at hesar broytingar koma at hava stórvegis ávirkan á raksturin fyrstu árini.

23.1.13. Skúlabókagerð (Rakstrarj.)

Hvør er eftirspurningurin eftir stuðli til gerð av skúlabókum?
Svar: Játtanin á Fíggjarlógini fyri 2012 er kr. 507.000 og verður bæði játtað privatum forløgum og einstaklingum. Eftirspurningurin hevur verið so mikið stórur øll árini, at Mentamálaráðið hevur ikki lýst við, at privat forløg og einstaklingar hava møguleika at søkja. Játtanin í 2012 er øll brúkt, men tað er ikki altíð, at útgávurnar hava verið lidnar, so at stuðulin hevur verið goldin ásetta árið, og í ár vanta enn tvey handrit, men fráboðað er, at tey koma í hesum árinum.

Hvussu nógv verður mett manglar í, fyri at skúlabókatilfarið í føroysku skúlunum verður mett nøktandi?
Svar: Tað er ilt at meta um, tí skúlarnir meta, at tørvurin er stórur. Enn verður framvegis mest undirvísingartilfar givið út til fólkaskúlan.

23.1.18. Nám (Rakstrarj.)

Er eftirmeting gjørd av samanleggingini, og um so er, hvør er niðurstøðan?
Svar: Nei, tað er ikki gjørd ein formell eftirmeting, men samanlagdi stovnurin hevur góðar virkisumstøður, nú alt virksemið er samlað á einum stað, og hølini gjørd av nýggjum.

Hví verður starvsfólkatalið hjá Nám skert?

Svar: Tað er ein avgerð hjá stovnsleiðsluni fyri, at játtanin skal kunna halda.

Leiðslan á Námi hevur boðað frá, at fráfaringarnar eru av natúrligum slagi fyri aldur, og so statt hevur talan ikki verið um uppsagnir.

Hvør er grundgevingin fyri, og hvørjar eru mettu avleiðingarnar av, at skerja Nám við 700.000 kr., umframt at ongar lønarframskrivingar verða í 2013?

Svar: Landsstýrismanninum er tillutað ein ávís játtan til sítt virkisøki. Við nágreiniligari gjøgnumgongd av øllum kontunum var mett, at Nám kundi bera eina skerjing uppá kr. 700.000. Lønarframskrivingar hevur heldur eingin annar fingið.

Fyri at virksemið í Námi og harvið eisini veitingarnar til skúlaverkið skulu merkja sum minst til skerjingarnar, hevur verið neyðugt við tillagingum í starvsfólkatalinum.

23.1.31. Prófvtøkur (Rakstrarj.)

Játtanin lækkar, eitt nú til OECD-kanningar, PISA og TALIS. Hvør er orsøkin?
Svar: Í 2013 er eingin PISA kanning. Gjaldast skal tó fyri haldið og frágreiðingina. TALIS kanning er í 2013.

23.1.40. Næmingaheim (Stuðulsj.)

Álit er gjørt um næmingaheim í Suðuroy. Enn er tó ikki farið undir hetta.
Eisini eru ynskir um næmingaheim kring Føroyar. Eru ætlanir um at fara undir bygging av næmingaheimum í hesum valskeiðnum?
Svar: Bæði í Suðuroy og í Klaksvík eru ætlanir at fara undir at byggja lestraríbúðir. Fundur hevur verið við Klaksvíkar kommunu, og ætlanin hjá suðringum er at senda umsókn ein av fyrstu døgunum. Eingin ítøkilig umsókn er komin enn, og tí er heldur eingin peningur settur av til endamálið.

Landsstýrismaðurin er kortini av teirri áskoðan, at fjøltáttaðir bústaðarmøguleikar til lesandi kring landið hava stóran týdning fyri trivnaðin hjá teimum lesandi. Tí eigur landið at verða við í verkætlanum, sum hava sum mál at útvega lesandi hóskandi og bíligar íbúðir í lestrartíðini.

23.2.01. Fólkaskúlin (Rakstrarj.)

Hvørjar eru mettu avleiðingarnar av, at eingin lønar- og prísvøkstur er í játtanini fyri 2013?
Svar: Útreiðslan til lønarhækkingina fyri 2013 er leysliga mett til 2,5 mió.kr. Hóast tað verður mett, at virksemið í fólkaskúlanum kann halda fram á sama støði komandi ár.

Hvørjar ítøkiligar ætlanir eru, tá umræður at skipa skúlar og klassar í størri eindir?
Svar: Í løtuni er ábyrgdin av fólkaskúlanum tvíbýtt. Kommunurnar hava ábyrgdina av teimum fysisku karmunum, meðan Mentamálaráðið hevur ábyrgdina av lærarunum og innihaldinum. Í samgonguskjalinum er sett í kortið, at vit skulu hava størri skúlaeindir, tó við atliti at smáum

skúlum á útoyggj. Øll hesi viðurskifti verða tikin við í arbeiði at fáa skipa framtíðar bygnaðin í fólkaskúlanum, sum Mentamálaráðið fer at seta ferð á í næstum.

23.2.02. Sernám (Rakstrarj.)

Er eftirmeting gjørd av sernámsfrøðiligu tænastueindunum í Tórshavn, Suðuroynni og Eysturoynni? *Svar: Nei, eingin skrivlig eftirmeting fyriliggur enn, men landsstýrismaðurin hevur havt fund við avvarðandi partar um at fáa eftirmetingina framda skjótast gjørligt. Kommunurnar verða eisini partur av hesum arbeiði.*

Um ikki, er so ætlanin at gera hetta, áðrenn ein tænastueind verður skipað í Klaksvík?
Svar: Ætlanin er, at eftirmetingin skal gerast, áðrenn nýggjar skipanir verða settar á stovn.

Kann Fíggjarnevndin fáa upplýsingar um kostnað og starvsfólk býtt á arbeiðsøki (skrivstovufólk, sálarfrøði v.m.) fyri hvørja sernámsfrøðiliga eind sær?

Sí niðanfyri standandi talvu um kostnaðin av tænastueindunum.

	Suðuroy		**Eystur**		**Tórshavn**		**Norður**	
	Sørv	Kostnaður	Sørv	Kostnaður	Sørv	Kostnaður	Sørv	Kostnaður
Skrivstovustarv	1,0	(kommunan)	1,0	(kommunan)	1,0	(kommunan)	0,5	(kommunan)
Deildarleiðari	1,0	528.000	1,0	528.000	1,0	528.000	0,8	100.000
Sálarfrøði	0,5	299.100	1,3	602.625	2,5	1.305.580		
Tala	0,8		1,8	421.000	3,0	1.284.500		
Ráðgeving	0,3		1,0	450.000	1,0	559.509	1,0	559.509
Íalt	3,7	**827.100**	6,0	**2.001.625**	8,5	**3.752.364**	2,3	**659.509**
Barnatal		1.128		2.675		5.604		1.554

Viðv. Partar av útreiðslunum verða rindaði av kommunum ella øðrum játtanum og tey útreiðslutølini eru ikki tikin við her.

Er ætlanin at víðka virksemið á skúlanum á Trøðni til eisini at veita miðnámsskúlatilboð?
Svar: Ætlanir er ikki av víðka virksemið í skúlanum á Trøðni til eisini at veita miðnámsskúlatilboð. Hinvegin verður arbeitt við eini ætlan at skipa miðnámsskúlatilboð til ung við serligum avbjóðingum í sama umhvørvi, sum verandi miðnámsskúlar eru. Í hesum sambandi hevur landsstýrismaðurin m.a. samskift við Javna um ætlanina. Annars verður eitt av fyrstu stigunum, ið verða tikin at fara kunningarferð til Íslands, fyri at kanna, hvussu íslendingar hava skipað síni miðnámsskúlatilboð fyri ung, ið bera brek.
Leggjast kann afturat, at frá 1. august 2013 er ætlanin at skipa ein serligan miðnámsskúlaflokk fyri næmingar við autismu/asberger.

Hvør er metti kostnaðurin av at seta á stovn miðnámsskúlatilboð, ið nøktar eftirspurningin hjá ungum við serligum avbjóðingum í Føroyum?

Svar: Av tí at skipanin við miðnámsskúlatilboði til ung við serligum avbjóðingum ikki er fastløgd enn, ber ikki til at meta neyvt um kostnaðin. Kortini ber til at siga, at skal miðnámsskúlatilboð standa øllum ungum í boði, uttan mun til brek, so verður kostnaðurin av hesum í fyrsta umfari fleiri tíggjutals milliónir. Tó skal undirstrikast, at íløgur í slík tilboð fara heilt víst at løna seg við tíðini. Bæði tí, at tey ungu við serligum avbjóðingum gerast meira sjálvbjargin, um tey fáa røttu tilboðini, og tí, at fleiri familjur, sum annars eru noyddar at flyta av landinum, fáa møguleikan at verða verandi.
Í dag verður nógvur peningur eisini nýttur á almannaøkinum til tilboð, ið ung við serligum avbjóðingum fáa í Danmark.

Hvør samskipan er millum Sernám, sernámsfrøðiligu tænastueindirnar og Skúlan á Trøðni?
Svar: Sernámsfrøðiligu tænastueindirnar eru partar av Sernámi, og verður alt virksemið samskipað, til tess at tryggja eins tænastu til alt landið.
Sernám og Skúlin á Trøðni hava síðani 2005 verið tveir sjálvstøðugir stovnar við hvør sínari játtan og leiðslu. Høvuðsdeildin hjá Sernám heldur til í hølum hjá Skúlanum, og ber skúlin rakstrarútreiðslurnar av bygninginum. Harumframt verður upptøka av næmingum til Skúlan samskipað við Sernám sambært serskúlalógini. Eisini er álagt, at stjórin í Sernám og skúlastjórin í Skúlanum á Trøðni skulu samstarva og í felag menna sernámsfrøðiliga virksemið.

Hvørjar eru mettu avleiðingarnar av, at eingin lønar- og prísvøkstur er í játtanini fyri 2013?
Svar:Metti lønar- og prísvøksturin svarar til á leið ½ mió.kr. Leiðslan á Sernámi hevur lagt upp til, at upphæddin verður spard á lønarkarminum.

23.2.03. Stuðul til fólkaskúlar (Stuðulsj.)

Hví hækkkar játtanin til privatar skúlar, hóast flestu aðrar játtanir standa í stað í 2013 í mun til 2012?
Svar: Hædd er tikin fyri, at Frískúlin Keldan tekur ein flokk afturat inn næsta skúlaár. Keldan hevur til og við triðja flokk í ár.

23.2.06. Skúlatilboð til ung við breki (Rakstrarj.)

Heldur landsstýrismaðurin, at tað er nøktandi, at 7 næmingar 3. hvørt ár verða tiknir inn á hetta skúlatilboðið?
Svar: Landsstýrismaðurin heldur ikki, at skúlatilboðini til ung við breki eru nøktandi. Støða er kortini ikki tikin til at víðka verandi skúla- og bútilboð á Rásini. Mentamálaráðið arbeiðir tó við at gera umstøður fyri, at serlig undirvísingartilboð fyri næmingar við menningartarni kunnu verða skipað í fólka-, vinnu og miðnámsskúlum.

Eisini verður, sum nevnt í øðrum svari, arbeitt við eini ætlan um at skipa serliga tilrættalagdar miðnámsútbúgvingar til ung við serligum avbjóðingum.

Hvussu nógv fingu avslag seinast, næmingar vórðu tiknir inn?
Svar: 17 næmingar søktu um upptøku á Rásini á heysti 2012. 7 næmingar vórðu tiknir inn. Hesir byrjaðu í januar 2012. Men tølini siga ikki alt um veruliga tørvin, sum er væl størri. Sernám metir við støði í næmingum, ið hava serligan tørv í fólkaskúlanum, at tørvur er á tilboðum til fleiri enn 30 næmingar um árið, aftaná 9. og 10. flokk.

23.3.02. Studentaskúlin og hf-skeiðið í Eysturoy (Løguj.)

Nær væntast byggiskráin at vera klár?

Svar: Landsstýrismaðurin fekk byggiskránna handaða 17. oktober 2012.

23.3.05. Miðnámsútbúgvingar (Rakstrarj.)

Verða allir skikkaðir umsøkjarar tiknir inn á miðnámsútbúgvingarnar í 2012 og 2013?

Svar: Afturmeldingarnar frá skúlunum vóru, at teir, sum skúlarnir mettu skikkaðir, vóru upptiknir.

Hvussu nógv hava søkt, og hvussu nógv vórðu upptikin á ymsu miðnámsskúlarnar í 2012?

Svar: Upptøkurnar á ymsu miðnámsskúlunum vóru í 2012 hesar:

	Student	HF	FHS/HH	HT	Fiskivinna	SIT	Byggitøkningur	Framleiðlsutøkn.	Klædnaatst.	Íalt
Føroya Studentaskúli og HF skeið	254	78								332
Handilsskúlin í Havn			149							149
Tekniski skúli í Havn						113	31	15	14	173
Studentaskúlin og HF-skeiði í Eysturoynni	89	25								114
Handilsskúlin í Kambsdali			93							93
HF-skeið í Klaksvík		38								38
Tekniski skúli í Klaksvík				35		67				102
Fiskivinnuskúlin í Vestmanna					26					26
Miðnámsskúlin í Suðri	48									48
Íalt	391	141	242	35	26	180	31	15	14	1075

Sæð í ljósinum av nýggju miðnámsskúlaútbúgvingini, og samskipanini av skúlunum í Tórshavn, hvussu verða Tekniski skúli í Klaksvík, Klaksvíkar HF-skeið og Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoynni skipað bygnaðarliga frameftir?

Ætlanin er at samskipa virksemi í skúlunum í Eysturoynni, soleiðis at talan verður um ein skúla. Ætlanin er eisini at samskipa virksemi í Eysturoynni og í Klaksvík í størri mun, men støða er ikki tikin til at leggja hesar skúlar saman.

Hvør er høvuðsorsøkin til stóra munin millum eindarkostnaðin í ymsu miðnámsskúlunum? T.d. kostar ein HF-næmingur kr. 42.385 kr. í Tórshavn, 45.489 kr. í Eysturoynni og 55.820 kr. í Klaksvík.

Svar: Tað er serliga næmingatalið, sum er avgerandi fyri eindarkostnaðin. Í skúlum við fleiri næmingum kunnu valfak mannast við fleiri næmingum. Eindarkostnaðurin fyri hvønn næming á ymsu miðnámsskúlunum skal takast við fyrivarni, av tí at uppgerðarhátturin kann verða ymiskur.

Hví hækkar játtanin til Fiskivinnuskúlan við 400.000 kr., hóast næmingatalið minkar?

Svar: Stórsta orsøkin til meirjáttanina er, at eftirlønir hjá lærarum hækka frá 2012 til 2013. Hetta kemst av, at fleiri lærarar nú eru kvotasettir, og tískil hava sáttmálakravdan rætt til eftirløn.

Hví lækkar talið av næmingum í Føroya Handilsskúla úr 920 í 761 frá 2012 til 2013?
Svar: FHS lærlingar eru ikki taldir við í 2013, og er hetta ein feilur. FHS lærlingar verða væntandi 48 í 2013, sum skulu leggjast afturat. Í uppgerðini verður eisini roknað við færri kvøldskúlanæmingum, men er hetta ivasamt.

Hví lækkar talið av næmingum í Tekniska Skúla í Havn úr 354 í 283 frá 2012 til 2013?
Svar: Virksemisyvirlitið er ikki eftirfarandi í samanberingini millum 2012 og 2013, av tí at útrokningarnar í 2013 eru gjørdar við støði í nýggju eindarskipanini fyri teknisku útbúgvingarnar. Mentamálaráðið hevur ikki havt stundir at greina munin nærri í sambandi við hetta svarið.

Hvørjar eru mettu avleiðingarnar av, at eingin lønar- og prísvøkstur er í játtanini fyri 2013?
Svar: Lønar og prísvøkstur svara til áleið 1,6 mió. kr.

Hvat kostar lærugreinin fimleikur?
Svar: Mentamálaráðið hevur ikki upplýsingar um kostnaðin á lærugreinini fimleikur á miðnámsskúlunum. Neyðugt verður at fáa skúlarnar at svara hesum spurningi, og skotbráið hevur verið ov stutt í hesum umfari

23.3.07. Tekniski skúli í Klaksvík (Løguj.)

Játtanin til Tekniska skúla í Klaksvík stendur til at minka í 2014 og 2015 í mun til 2013, men roknað verður við øktum virksemi, tá hølini verða klár, gevur tað ikki hægri rakstur?
Svar: Samlaða játtanin til allar miðnámsskúlarnar verður sambært fíggjarlógaruppskotinum skorin. Í 2014 lækkar játtanin við 2 mió. kr. og í 2015 við 3,5 mió. kr. Ætlanin er at fremja sparingarnar við rationaliseringum. M.a. verður roknað við, at nýggja eindarskipanin, ið samskipar SIT-útbúgvingar og yrkisútbúgvingarnar á teknisku skúlunum fer at gera skipanina bíligari at reka.

Hvørjar eru ítøkiligu nýggju ætlanirnar fyri Tekniska skúla í Klaksvík, tá umræður matvøruút-búgvingina?
Svar: Talan er um hesar matvøruútbúgvingar:

1. *Støðisútbúgving innan matvøru (SIT)*
2. *Yrkisútbúgvingar innan matvøruøki (tilmæli juni 2013)*
3. *Útbúgvingar innan matvøru á heilsuøkinum og á stovnum, kantinum v.m. (tilmæli juni 2013)*
4. *Gymnasiala breytin innan matvøru og prosess*
5. *Skeið og eftirútbúgving fyri vinnu og stovar*

8. Í mai í 2012 samtykti Løgtingið lógaruppskot um at samskipa verandi SIT skipan við skúlaskeiðini í lærlingaskipanini, og fara yvir til eina sokallaða eindarskipan.

Nýggja skipanin er soleiðis uppbygd, at øll skúlaskeiðini hjá lærlingum í framtíðini verða skipað í 3 skúlaskeið á umleið 20 vikur ella 1½ ár. Eindarskipanin fer eisini at fevna um eitt fjórða skúlaskeið, ið er ætlað sum støði undir víðari tøkniligari útbúgving ella beinleiðis inn á eina gymnasiala útbúgvingarbreyt.

Ætlanin er at fara undir eindarskipanina frá august 2013. Matvøruútbúgvingin er skipað undir SIT-lógini og fylgir tí við inn í nýggju eindarskipanina og verður harvið ment fakliga og bókliga. Talan er sostatt um eina støðuga menning frá støðisútbúgving til yrkisútbúgvingar, miðnám og seinni til víðari lestur á eitt nú Fróðskaparsetrinum.

Sum fiskivinnutjóð og matvøruframleiðari er tað týdningarmikið at menna viðkomandi útbúgvingar innan hesi øki. Landsstýrismaðurin fer tí at seta arbeiðsbólk at gera tilmæli um at flyta alla útbúgvingina til kokk og føðsluatstøðara heim til Føroyar. Arbeiðsbólkurin verður mannaður við umboðum fyri vinnuna, Yrkisdepilin, Mentamálaráðið og Tekniska skúla í Klaksvík. Væntandi kemur arbeiðsbólkurin við einum tilmæli áðrenn summarfrítíðina juni 2013.

Er framhaldandi ætlanin at hava HF-útbúgving bæði á Kambsdali og í Klaksvík?
Svar: Ætlanin er at hava HF-útbúgvingina bæði í Klaksvík og á Kambsdali.

Landsstýrismaðurin hevur upplýst, at útbyggingin verður gjørd við støði í eini heildarætlan fyri útbúgvingarøkið í Klaksvík. Hvør er heildarætlanin fyri útbúgvingarøkið í Klaksvík?
Svar: Byggiskrá, ið lýsir um- og útbyggingina á Tekniska Skúlanum í Klaksvík, er latin landsstýrismanninum. Henda er at finna á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum. Í sambandi við um- og útbyggingina, sum nú verður fyrireikað, verður serligur dentur lagdur á at útvega nýggju matvøruútbúgvingini og HF-næmingunum tíðarhóskandi hølisumstøður.

Hvussu verður henda ætlan samskipað við skúlarnar á Kambsdali?
Svar: Ætlanin við útbyggingunum í Klaksvík og á Kambsdali er ikki at flyta útbúgvingar úr einum stað í annað. Ætlanin er heldur at útvega næmingum og starvsfólki á báðum støðum betur hølisumstøður.

Verða ætlanirnar viðvíkjandi teknisku útbúgvingunum í Klaksvík samskipaðar við teknisku útbúgvingarnar í Tórshavn?
Svar: Ætlanin er sum sagt at útvega nýggju matvøruútbúgvingini á Tekniska skúlanum í Klaksvík betur og tíðarhóskandi hølisumstøður, sum eru staðsettar á Tekniska Skúlanum. Eingin matvøruútbúgving er í løtuni á Tekniska skúlanum í Tórshavn. Tí kann sigast, at útbyggingin innan matvøruøkið á teknisku skúlunum er samskipað á tann hátt, at útbúgvingin bert er á øðrum skúlanum.

23.3.09. Skúladepil við Marknagil (Løguj.)

Nær væntast samráðingarnar at verða avgreiddar? á langtíðar íløguætlanini?
Svar: Landsverk hevur upplýst fyri landsstýrismanninum, at samráðingarnar verða lidnar einaferð fyrst í desember2012.

Nær væntast, at spakin verður settur í, og farið verður undir byggingina? á langtíðar íløguætlanini? *Svar: Ætlanin er at seta spakan í mars 2013.*

Hvussu stórur er metti eykakostnaðurin fyri, at skúladepilin er útsettur fyrst frá 2014 til 2015 og nú til 2016? *Svar: Landsverk hevur áður mett, at útsetanin kostar umleið 12 mió. kr. um árið.Tá hevur serliga verið lagt upp fyri meirkostnað í mun til eina langa byggitíð. Nú verður byggitíðin ikki so long, sum upprunaliga roknað varð við.Tí fyrireikingarnar hava tikið nógv longri tíð enn upprunaliga mett. Av tí sama fyriliggur eingin neyv og nýggj meting av meirkostnaðinum orsakað av, at skúlin ikki fer at standa liðugur fyrr enn í 2016.*

Kann hugsast, at neyðugt verður at leggja hesar meirútreiðslur afturat játtanarkarminum í verklagslógini? *Svar: Arbeitt verður við at fremja byggingina við verandi játtan.*

Í samband við fíggjarlógina fyri 2012 var spurningur settur við, hví játtanin til depilin varð lækkað, og um landsstýrismaðurin fór at halda seg til tær 85 mió. kr., ið vórðu settar av í 2013. Tað váttaði landsstýrismaðurin, at hann fór. Men landsstýrismaðurin hevur nú minkað játtanina til Marknagilsdeplin í 2013 við 25 mió. kr., soleiðis at neyðugt nú verður at játta 85 mió. kr. í 2014, 95 mió. kr. í 2015 og 90 mió. kr. í 2016 - er ikki stórur vandi fyri, at depilin als ikki verður liðugur í 2016? *Svar: Ætlanin er framvegis, at skúlin skal standa liðugur í 2016. Komandi ár verða uml 130 mió. kr. tøkar at arbeiða fyri við játtaða peninginum í 2013 og støðlaða peninginum.*

Játtanin til útbygging av Psykiatriska deplinum varð løgd soleiðis, at hon í 2016 skuldi økjast munandi, tí tá skuldi Skúladepilin í Marknagili vera liðugur. Skal Psykiatriski depilin eisini útsetast á langtíðar íløguætlanini? *Svar: Mentamálaráðið kennir ikki ætlanirnar við Psykiatriska deplinum nóg væl til at svara hesum spurningi. Rættast hevði ivaleyst verið at sett landsstýrismanninum í heilsumálum spurningin.*

23.5.10. Musikkskúlar (Rakstrarj.)

Hvørjar eru mettu avleiðingarnar av, at eingin lønar- og prísvøkstur er í játtanini fyri 2013? *Svar: Musikskúlaleiðarin hevur upplýst, at undirvísingartímatalið væntandi má lækkast við umleið 18 klokkutímum um vikuna, og eini 36 næmingar verða færri.*

Er nøkur eftirmeting gjørd av verandi musikkskúlaskipan?
Svar: Eingin formlig eftirmeting er gjørd av skipanini.

Um so er, hvat var niðurstøðan?

Eru ætlanir um at fremja átøk, ið kunnu menna musikkskúlan, so pláss verður fyri at taka fleiri inn?
Svar: Við hægri játtan hevði borið til at tikið fleiri næmingar inn í skipanina uttan at gjørt aðrar broytingar. Men tað eru ásetingar í lógini, sum ikki samsvara heilt við umsitingina av lógini. Tí verður arbeitt við at tillaga lógina soleiðis, at hon er í samsvari við háttin, hon verður umsitin eftir.

23.6.05. Maritimir skúlar (Rakstrarj.)

Hvørjar menningarætlanir liggja fyri framman fyri hetta økið?
Svar: Ætlan er millum annað at uppstiga skipsførara- og maskinmeistaraútbúgvingarnar á bachelorstig.

Er nøkur ætlan viðvíkjandi størri samskipan millum maritimu útbúgvingarnar í Klaksvík og Tórshavn?
Svar: Arbeitt verður í løtuni við eini ætlan um at samskipa skeiðsvirksemið á Trygdarmiðstøðini í Klaksvík og Brandskúlanum við Áir. Ætlanin er eisini at samskipa skeiðstilboðini á Vinnuháskúlanum og Klaksvíkar Sjómansskúla, sum longu verður samstarvað um, uppaftur betur.

Hví hava eingir maskinistnæmingar verið á Vinnuháskúlanum í 2011 og 2012?
Svar: Í august 2011 byrjaðu 20 maskinistnæmingar á Vinnuháskúlanum. Hesir vóru lidnir í februar 2012. Maskinistútbúgvingin tekur 8 mánaðir. Tikið verður inn triðja hvørt hálvár fyri at fáa ein fullan flokk. Maskinistflokkur verður eftir ætlan tikin inn aftur í januar 2013.
30 næmingar hava søkt um upptøku í januar 2013.

Hví minkar talið av skipara-, maskinmeistara- og skipsføraranæmingum á Vinnuháskúlanum í 2013 í mun til 2012?
Svar: Næmingatalið í 2013 verður hægri enn tað, sum stendur í virksemisyvirlitinum B fyri fíggjarætlanina 2013. Hetta kemur av, at næmingar verða tiknir inn, eftir at virksemisyvirlitið er skrivað. Næmingatalið verður ikki minni enn i 2012, tí allir flokkar, sum byrja í 2013, eru fult teknaðir. Ein flokkur verður tikin inn fyri hvørja útbúgving, og pláss er ikki fyri fleiri. Vanliga verða 27 næmingar tiknir inn til hvønn flokk.

Fara verandi útbúgvingar á Vinnuháskúlanum at halda áfram, hóast farið verður undir eina Bachelor útbúgving somuleiðis?
Svar: Verandi útbúgvingar fara at halda fram.

Nær verður klárt at fara undir maritima Bachelor útbúgving?
Svar: Bachelorútbúgvingarnar kunnu í fyrsta lagi byrja í august 2014.

Hví minkar játtanin til Vinnuháskúlan í 2014 og 2015, um so er, at ætlanin er at fara undir eina Bachelor útbúgving afturat verandi útbúgvingum á Vinnuháskúlanum?
Svar: Akademiskar bachelorútbúgvingar kunnu best skipast á einum universiteti ella í tøttum samstarvi við eitt universitet. Maritimu bachelorútbúgvingarnar verða eftir ætlan annaðhvørt skipaðar sum ein partur av útbúgvingartilboðnum á Fróðskaparsetrinum ella í tøttum samstarvi við Setrið.

Trygdarmiðstøðin

Kappingarráðið hevur tikið avgerð um, at rakstrarjáttanin til Trygdarmiðstøðina er í beinleiðis stríð við kappingarlógina. Hvørjar tillagingar eru ella fara at verða gjørdar?

Svar: Landsstýrismaðurin í mentamálum varðar av lóggávuni um útbúgving av manning á skipum og hevur tí víðari heimildir at áseta reglur, so at Trygdarmiðstøðin virkar í samsvari við lóggávuna.

Mentamálaráðið hevur í tí sambandi ásett í kunngerð gjald fyri lógarkravd skeið innan trygd á sjónum.

Eru skeiðini á Trygdarmiðstøðini eisini almenn uppgáva í grannalondum okkara?
Svar: Í Danmark verða skeiðini boðin út av skúlunum og av privatum. Í Íslandi verða skeiðini eisini alment útboðin.

Um verandi virksemi á 5 mió. kr. hjá Trygdarmiðstøðini varð niðurlagt – vóru privatir aktørar á marknaðinum, ið kundu bjóðað somu tænastu til góðan prís?
Svar: Sambært lóg (§ 7 stk. 2 í løgtingslóg nr. 55 frá 24. apríl 2001) skal landsstýrismaðurin virka fyri, at serskeið, sum eftir altjóða krøvum eru neyðug fyri manningina, verða hildin í skúlunum. Virksemið á Trygdarmiðstøðini er fevnt av altjóða krøvum.
Privatir eru á marknaðinum, men tað ber kortini ikki til hjá Mentamálaráðnum neyvt at meta um, um privatir høvdu nøktað marknaðin "til góðan prís", um virksemið á Trygdarmiðstøðini varð niðurlagt.

Í viðmerkingunum stendur: "Játtanin verður veitt, so stovnurin kann veita skeið innan trygd á sjónum fyri ein lægri kostnað. Hvør er løgfrøðiliga heimildin?
Svar: Kunngerð nr. 100 frá 12. oktober 2012 um gjald fyri skeið innan trygd á sjónum er lýst við heimild í lógini um útbúgving av manning á skipum v.m.

Hvørji trygdarskeið verða útbjóðað fyri lægri kostnað, og hvørji verða útbjóðað til marknaðar-prís?
Svar: Lógarkravdu trygdarskeiðini verða boðin út fyri ein lægri kostnað.

23.6.16. Fróðskaparsetur Føroya (Rakstrarj.)

Hví verður játtanin til verandi virksemi skerd við 1,5 mió. kr.? *Svar: Játtanin verður skerd, tí at landsstýrismaðurin hevur fingið ein avmarkaðan fíggjarkarm at halda seg til.*

Hvørja ávirkan verður mett, at henda skerjing fær? *Svar: Landsstýrismaðurin heldur sparingina verða ráðiliga, tí at stórar samanleggingar eru framdar á Setrinum við tað, at Læraraskúlin, ið útbúgvir lærarar og námsfrøðingar, og Sjúkrarøktarfrøðiskúlin eru lagdir saman við restini av Fróðskaparsetrinum. Landsstýrismaðurin hevur tí mælt Setrinum til at fremja sparingarnar við rationaliseringum í rakstrinum í sambandi við samanleggingarnar.*

Ongar lønar- og prísframskrivingar eru framdar fyri 2013 – hvørja ávirkan verður mett, at hetta fær? *Svar: Torført er í løtuni at siga, hvørja ávirkan hetta kemur at hava við sær fyri fíggjarárið 2013. Fleiri lønarútreiðslur verða ikki fyri 2013, og virksemið verður tillagað samsvarandi.*

Hvussu gongur við umskipanini av virkseminum til lóggávuna frá 2008? *Svar: Fróðskaparsetur Føroya hevur síðani samanleggingina í 2008 støðugt arbeitt við at tillaga virksemið, so at samanleggingin sæst aftur í bygnaðinum. Tilgongdin hevur verið drúgv, tí einki útgreiningartilfar var gjørt í sambandi við nýggju lógina, byrjað varð nærum á berum. Samanleggingin hevur tó sum heild eydnast væl. Sjúkraræktarfrøði, lærara- og námsfrøðiútbúgvingarnar, sum undan lóggávuna frá 2008 virkaðu sum sjálvstøðugar útbúgvingar við egnari lóg og kunngerðum, eru nú integreraður partur av Fróðskaparsetrinum við felags samleika.*
Bygnaðarliga er Fróðskaparsetrið skipað við tveimum megindeildum ávikavist Megindeildin fyri hugvísindi, samfelagsvísindi og námsvísindi og Megindeildin fyri náttúruvísindi og heilsuvísindi.
Setrið er farið undir at tillaga virksemið eftir nýggja bygnaðinum, arbeitt verður m.a. við at útgreina møguleikar fyri tvørgangandi undirvísing og gransking, at samskipa fyrisitingina, umframt sum frá líður at skapa eitt felags lestrarumhvørvi. Harumframt verður arbeitt við at uppstiga starvsfólkini innan heilsuvísindi og námsvísindi, tí Setrið hevur skyldu sambært lóg at veita granskingargrundaða frálæru.

Hvørjar nýggjar útbúgvingar kunnu væntast í hesum valskeiðnum? *Svar: Í 2011 vórðu tveir arbeiðsbólkar settir at gera uppskot til menning av granskingargrundaðum útbúgvingum innan ávíkavíst fjølmiðlafrøði og matfrøði. Bólkarnir hava latið ávegis tilmæli úr hondum, ið vísa á, at hesar útbúgvingar kunnu partvís byggja á verandi vísindaøki á Setrinum, umframt at neyðugt er at seta nýggj granskingarstørv. Tilmælini verða í løtuni viðgjørd í leiðsluni.*
Fyrireikað verður masternám í løgfrøði.
Endurskoðað náttúruvísindalig bachelor útbúgving verður fyrireikað – møguliga sum verkfrøðiútbúgving.
Setrið er saman við 4 øðrum universitetum við í umsókn til norðurlendska ráðharraráðið (NMR) um stuðul til felags norðurlendskt masternám í burðardyggari samfelagsmenning.
Farið verður undir at kanna, um grundarlag er fyri at menna gransking og undirvísing í búskapi.
Farið verður undir at kanna, um grundarlag er fyri, í øktum samstarvi við Landssjúkrahúsið, at etablera gransking og undirvísing (grundnám) í heilsuvísindi (medisin).

Hvussu gongur við løgfrøðiligu útbúgvingini? *Svar: Arbeitt verður við at skriva eina yvirskipaða lýsing av masterútbúgving í løgfrøði. Eitt nú skal støða takast til vav og skeið, kravd og valfrí. Í løtuni verða einstøk skeið á masterstigi boðin út, sum kunnu verða partar í masterprógv á Setrinum.*

Hvussu nógv skikkað hava søkt, og hvussu nógvir næmingar verða tiknir inn á ymsu útbúgvingarnar á Fróðskaparsetri Føroya í summar? *Svar: Tilsamans 350 umsóknir komu inn til útbúgvingarnar í 2012. Av hesum vóru 288 skikkað, 221 vórðu upptikin.*
Býtið millum útbúgvingarnar var soleiðis:

- *30 føroyskt BA*
- *2 føroyskt hjánám*

- *34 KT-verkfrøði*
- *15 lívfrøði*
- *37 lærara*
- *37 námsfrøði*
- *25 samfelagsvísindi*
- *23 sjúkrarøktarfrøði*
- *18 søga*
- *Vegna ov veikt studentagrundarlag var ikki tikið inn í náttúruvísindum við denti á jarðfrøði ella havfrøði.*

Endalig avgerð er ikki tikin um, hvussu nógvir næmingar verða tiknir inn í 2013.

Ynskt verður at fáa eitt samlað yvirlit yvir næmingatilgongd, frágongd seinastu 5 árini.
Svar:
Lesandi á teimum 5 deildunum á Setrinum uppgjørt pr. 1. oktober.:

pr.1.okt	2008	2009	2010	2011	2012
FMD	64	62	63	74*	87*
NVD	39	13	64	33	78
SSD	37	19	57	70	101
NÁD	237	260	266	298	290
SRFS	80	80	81	88	88

Tølini fevna ikki um stakgreinalesandi. Parttíðarlesandi eru tald við.

**ein minni partur av hesum eru skrásett sum óvirkin eitt tíðarskeið*

Á Føroyamálsdeildini og á Náttúruvísindadeildini er fráfallið lutfalsliga størri enn á hinum deildunum.

Hvussu gongur við at savna eftirútbúgving á Fróðskaparsetri Føroya? *Svar: Setrið bjóðar nú ískoytisútbúgvingar til lærarar og sjúkrarøktarfrøðingar. Skeiðini eru skipað sum 30 ECTS gjaldsskeið.*
Í lóg verða stakskeið boðin út, fleiri teirra á masterstøði. Vøksturin á hesum økjum setir stór og nýggj krøv til bæði fyrisiting og vísindafólk. Tí verður arbeitt við at skipa stakgreinalesnaðin betur, bæði fíggjarliga og fyrisitingarliga.
Viðvíkjandi undirkontu 7.23.6.16.30 til eftirútbúgving er ræðisrætturin ikki fluttur úr Mentamálaráðnum til Setrið.

Altjóða Skrivstovan er nú løgd undir konto hjá Fróðskaparsetri Føroya. Hvør er høvuðsorsøkin til hetta? *Svar: Altjóða Skrivstovan hevur húsast á Setursskrivstovuni, síðani hon var sett á stovn í desember 2000. Samstarvið millum Setrið og Altjóða Skrivstovuna hevur verið støðugt vaksandi hetta tíðarskeiðið. Mentamálaráðið tók avgerð um at leggja Altjóða skrivstovuna undir Fróðskaparsetrið í 2010.*
Orsøkin til at leggja undirkontur saman er, at nýggi bygnaðurin á Fróðskaparsetri Føroya endurspeglast á Fíggjarlógini.

Varðveitir skrivstovan fulla frælsið til at ráðgeva næmingum? *Svar: Altjóða Skrivstovan varðveitir sína upprunaligu vegleiðarafunktión, tó verður virksemið nakað tillagað, tí Altjóða Skrivstovan verður eisini ein partur av nýstovnaða vegleiðaratoyminum á Setrinum.*

Búskaparráðið verður flutt til Fróðskaparsetur Føroya. Fluttar verða í hesum sambandi 2,2 mió. kr. frá Landsbanka Føroya til Fróðskaparsetur Føroya. Í viðmerkingunum verður sagt: «Við hesi flyting av akademiskum størvum verða eisini lunnar lagdir undir at skipa útbúgvingartilboð í búskaparfrøði». Hvør er ætlanin?
Svar: Ásannað verður, at tað er tørvur á gransking og undirvísing í búskapi grundað á føroysk viðurskifti. Viðvíkjandi búskaparfrøði er í løtuni einans hálvt vísindastarv á Fróðskaparsetrinum. Frá tí at SSD noyddist nærum at niðurleggja sítt virksemi í 2008/09 orsakað av vantandi fígging, er deildin nú endurreist aftur. Granskað og undirvíst verður í søgu, samfelagsfrøði og stjórnmálafrøði. Við trimum árgangum av bachelorstudentum er talið av fulltíðarlesandi á deildini farið uppum 100.
Í hoyringarskrivi til løgtingsmál nr. 24/2012 skrivar Fróðskaparsetrið, at tað verður mett, at skrivarauppgávan hjá Búskaparráðnum, at fylgja við í búskaparligu gongdini í landinum og ráðgeva um búskaparlig viðurskifti, kann samskipast við tilgongdini at menna gransking og undirvísing í búskapi á Fróðskaparsetrinum.
Í viðmerkingunum til lógaruppskotið var tilmælt, at gransking eigur at verða nevnd positivt t.d. soleiðis: "Við hesi flyting av akademiskum størvum verða eisini lunnar lagdir undir at skipa gransking og útbúgvingartilboð í búskaparfrøði".
Harumframt var í hoyringarskrivinum víst á, at tað er neyðugt, at akademisku størvini, ið verða sett á Setrinum, til at røkja nevndu skrivarauppgávu, uppfylla krøv Setursins til akademisk størv, sí http://setur.fo/fileadmin/user_upload/SSS/PDF-filur/Regluverk/Um_Frodskaparsetur_Foroya/Reglugerd_fyri_storv_a_Frodskaparsetri_Foroya_021111.pdf
Starvsfólk, sum eftir hesum møguliga verða flutt til Setrið, mugu hava førleika til at undirvísa og granska í búskapi. Fróðskaparsetrið hevur mannagongdir til at meta um førleikan at innganga í akademisk størv, og tí er tað av stórum týdningi, at hesar mannagongdir verða fylgdar.

Sagt hevur verið, at allar verandi uppgávur í Landsbankanum verða røktar við umskipanini. Samstundis verður sagt at Búskaparráðið verður styrkt. Men hartil skulu somu fólk nýtast til at skipa nýtt útbúgvingartilboð – hvussu hongur hetta saman?
Verður søkt eftir nýggjum fólkum til at skipa útbúgvingartilboð í búskaparfrøði?
Svar: Í løtuni hevur Mentamálaráðið ikki innlit í, á hvønn hátt umskipanin er ætlað at fara fram. Sum almennur stovnur hevur Fróðskaparsetrið sum meginreglu, at nýggj størv verða lýst leys, og at fyri vísindastørv verður metingarnevnd sett at meta um akademisku førleikarnar.

23.6.20. Granskingarráð Føroya (Rakstrarj.)

3 fulltíðarstørv eru í Granskingarráði Føroya.
Hvussu nógv verður ráðgeving nýtt ísv. umsóknir t.d. til ES verkætlanir? *Svar: MN Svar: Av teimum 2,9 fulltíðarstørvunum í Granskingarráðnum eru uml. 1,4 til ES-granskingaravtaluna. Uppgávurnar á hesum økinum fevna í høvuðsheitum um kunningarvirksemi og ráðgeving. Beinleiðis ráðgeving fyllir nakað, men uppsøkjandi kunningarvirksemi meira. Tørvurin er nokkso ójavnur á ymsu økjunum, summi eru enn í uppbyggingarstøðu. Størst trýst er á ráðgeving uppundir umsóknarfreistir.*
Í sambandi við umsóknir um stuðul úr Granskingargrunninum er ráðgeving eisini nógv eftirspurd.

Nú eingin játtan verður til ES-granskingarskrá, tá verandi granskingarskrá er liðug, er ætlanin at halda áfram við ráðgeving ísv. ES-granskingarverkætlanir? *Svar: Tað verður roknað við, at Føroyar fara at halda fram við samstarvinum í Horizon 2020, samráðingar um hetta skulu byrja fyrst í 2013. Um so er, at Føroyar velja ikki at leingja samstarvið, má roknast við, at tað er tørvur á framhaldandi ráðgeving í eitt áramál til tær verkætlanir, sum hava fingið játtaðan stuðul til tíðarskeiðið útyvir 2013.*

Hvør er støðan viðvíkjandi peninginum í ”sjúkrakassagrunninum”? *Svar: Tað er Heilsumálaráðið, sum hevur ábyrgd av málinum, til peningurin er útgoldin Granskingargrunninum. Granskingarráðið hevur spurt Heilsumálaráðið eftir málinum, seinast var í farnu viku. Sambært Heilsumálaráðnum bíða tey eftir endaliga svarinum frá sjúkrakøssunum um, hvørja støðu tey hava til samtyktina hjá Løgtinginum. Tey vænta hetta svarið skjótt. Aftaná verður farið undir at skipa sjúkrakassagrunnin sambært teimum viðtøkum, sum vóru lagdar við lógaruppskotinum.*

Hvør er støðan viðvíkjandi Vísindaráðnum? *Svar: Fyrisitingin í Granskingarráðnum leggur í løtuni seinastu hond á tilmælið um verksetan av granskingarpolitikkinum Vitan & Vøkstur og tilmælið um fokusøkið fyri gransking. Roknað verður við, at Vísindaráðið verður kallað til fundar at viðgera hetta tilmælið sum skjótast.*

23.6.24. ES-granskingarskrá (Stuðulsj.)

Hvussu gongur hjá føroyskum granskarum at gerast partur av evropeiskum granskingarverkætlanum? *Svar: Tað gongur væl hjá føroyskum granskingarstovnum og fyritøkum at gerast partur av evropeiskum granskingarverkætlanum. Tað var greitt frammanundan, at tað var neyðugt at rokna við eini ávísari uppbyggingartíð í slíkum samstarvi, royndirnar higartil hava verið betri enn væntað. Á fundi við umboð fyri ES í summar var staðfest, at gott 50% av føroysku umsóknunum tá høvdu fingið játtað stuðul, miðaltalið fyri atknýtt lond er 23%. Samlað hava í alt 14 verkætlanir fingið játtað til samans 17,2 mió kr. í stuðli, síðani avtalan var undirskrivað í juni 2010.*

Hvussu nógvar verkætlanir og hvussu stóra játtan hava føroyskir granskarar fingið lut í í 2012 – og hvørji eru útlitini fyri 2013? *Svar: Viðvíkjandi játtanum 2012 verður víst til svarið omanfyri. Við royndunum higartil og teimum upplýsingum, vit hava frá stovnum og virkjum, rokna vit við, at útlitini fyri 2013 eru á leið tey somu sum í 2012.*

23.7.04. Lestrarstuðul (Lógarbundin j.)

Nær verður farið undir ætlanina at umleggja ein part av studninginum hjá lesandi uttanlands úr stuðli til lán? *Svar: Ætlanin er, at skipanin verður sett í verk 1. august 2013.*

Er hækking av studninginum á 0,85 % tikin við í játtanina?
Svar: Fýra tey síðstu árini er prístalsjavningin av stuðulinum avtikin við lóg. Ætlanin er ikki at broyta lógina fyri 2013. Tí verður lestrarstuðulin prístalsjavnaður aftur 1. august 2013. Roknað er við einum prístalsvøkstri uppá 2 % í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2013, ið er miðalprístalsvøksturin síðstu árini.

24.1.05. Tiltøk fyri børn og ung (Stuðulsj.)

Hví broytist játtanin frá Ítróttavedding úr 900.000 upp í 1.580.000 í 2013 ?
Fer økta játtanin til børn og ung burturav?
Svar: Talan er um eina tekniska hækking, sum samsvarar betur við metingarnar um støddina av upphæddini komandi ár. Øll játtanin fer til børn og ung.

24.1.13. Ymiskir studningar (Stuðulsj.)

Er ætlanin at leggja part av undirkontum til Mentanargrunnin at umsita? *Svar: Arbeitt verður við hesi ætlan.*

Hví lækkar játtanin til ungmannafeløg úr 170.000 kr. niður í 50.000 kr.?
Svar: Játtanin fer til Føroya Ungdómsráð og CISV barnalegur. Sum liður í sparingunum á mentanarøkinum verður skotið upp at skera játtanina til Føroya Ungdómsráð. Føroya Ungdómsráð nýtir sína játtan til rakstur av felagnum. FUR fær eisini part av veddingarpengunum. Veddingarpengarnir verða býttir út til limafeløgini í FUR, umframt at partur av pengunum fara til umsitingina av hesum pengum.

Hvussu verður stuðulin til skótarørsluna nýtt? *Svar: Stuðulin verður latin Føroya Skótaráð (FSR) at umsita. Partur av stuðlinum verður býttur millum tær fýra skótasamskipanirnar í Føroyum: Skótalið Frelsunarhersins, Føroya Skótasamband, Føroya KFUK-skótar og KFUM-skótarnir í Føroyum. (Stuðul verður ikki latin samskipanunum, tá Føroyar skipa fyri størri tiltøkum, t.d. norðurlendsku skótaráðstevnuni). FSR er limur í Nordisk Samarbeidskommité (NSK), og partur av stuðlinum verður nýttur til at luttaka í norðurlendskum og altjóða tiltøkum. Hesi tiltøk fevna um norðurlendska skótaráðstevnu, ungdómsráðstevnuna Ung i Norden og NOPOLK (Nordisk Patrulj och lederkurs), sum eru 3. hvørt ár (eitt hvørt árið), til skiftis í limalondunum, umframt onnur norðurlendsk tiltøk. Stuðulin verður eisini nýttur til at menna skótaleiðarar og patruljuskipan.*

24.1.26. LOA-grunnurin (Stuðulsj.)

540.000 kr. í limagjaldi. Hvussu nógv hava føroysk feløg fingið úr LOA-grunninum tey árini, ið vit hava rindað limagjaldið? *Svar: Føroysk feløg hava fingið kr. 6.185.000 árini 2010-2012. Limagjaldið íalt sama tíðarskeið er kr. 1.579.221. Munur/ágóði kr. 4.605.779. (Skótahúsið við Løkin / Fimleikarhøll í Runavík / Argja Róðrarfelag / Havnar Sjónleikarfelag).*

24.2.01. Tónleikur og sangur (Stuðulsj.)

Hví lækkar játtanin til tónleik og sang úr 365.000 kr. niður í 115.000 kr? *Svar: Talan er ikki um lækking. Talan er um, at Landsfelagið fyri føroyskan dans hevur fingið egna undirkontu ("Føroyskur dansur"), og felagið hevur av samlaðu játtanini fingið tillutað 250.000 kr.*

Metir landsstýrismaðurin, at tað er rætt, at hann deilir játtanir til ymsar partar í føroyska mentanarlívinum niður í smálutir – ella átti hann at lagt hetta til Mentanargrunnin at taka støðu til? *Svar: Arbeitt verður við spurninginum at flyta partar av stuðlinum til Mentanargrunn Landsins at umsita.*

24.2.04. Mentanargrunnurin (Stuðulsj.)

Hví verður Mentanargrunnurin skerdur við 20 %, tá flestu aðrar játtanir standa í stað ella økjast? *Svar: Landsstýrismaðurin hevur fingið ein avmarkaðan fíggjarkarm at halda seg til, mett verður, at Mentanargrunnurin framhaldandi kann virka hóast skerjingina.*

24.2.05. Umsiting av Mentanargrunninum (Rakstrarj.)

Verður arbeitt við at umskipa Mentanargrunnin til eitt Lista- og Mentanarráð? *Svar: Arbeitt verður við at tillaga lógina soleiðis, at Mentanargrunnurin eisini kann ráðgeva landsstýrismanninum í mentanarspurningum.*

24.2.06. Leiklist (Rakstrarj.)

Tjóðpallur Føroya

Hvørjar eru ætlanirnar hjá landsstýrismanninum við Tjóðpalli Føroya? *Svar: Ætlanin er, at virksemið hjá Tjóðpalli Føroya skal halda fram.*

Hvat verður gjørt fyri at fáa til vega nøktandi hølir til Tjóðpall Føroya? *Svar: Ætlanin er at fara undir at byggja nýtt Tjóðleikhús, sum eftir ætlan skal standa liðugt bygt í 2018.*

24.2.09. Tjóðleikhús (Løguj.)

Landsstýrið hevur ongar ætlanir at byggja Tjóðleikhús í hesum valskeiðnum. Tó eru 5 mió. kr. støðlaðar frá 2011. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin við hesum? *Svar: Landsstýrismaðurin fer í næstum at seta eina bygginevnd at gera tær neyðugu fyrireikingarnar til staðseting og bygging av Tjóðleikhúsi. Ætlanin er at brúka av støðlaðu upphæddini til hetta arbeiðið, soleiðis at alt er klárt í 2016, tá ið farið verður undir sjálva byggingina sambært samtyktu langtíðarløguætlanini.*

24.2.10. Norðurlandahúsið (Stuðulsj.)

Hví lækkar játtanin til Norðurlandahúsið úr 2,064 mió. kr. niður í 1,7 mió. kr.?
Svar: Fyri fíggjarárið 2011 var játtanin hækkað, tí Taks broytti mvg-avrokningarháttin soleiðis, at Norðurlandahúsið ikki fekk mvg aftur, tá keyps-mvg var hægri enn sølu-mvg.
Mett var, at hetta lækkaði tøku upphæddina við 1 mió. kr.
Endaligu uppgerðirnar fyri hesi árini vísa, at ikki var neyðugt at hækkað játtanina við meira enn 440 t. kr.fyri framvegis hava somu tøku upphæddina.

24.3.03./06 Søvn Landsins (Rakstrarj.) og (Stuðulsj.)

Hvussu gongur við samskipanini av søvnunum hjá Søvn Landsins? *Svar: Í roynd og veru gongur hetta ov spakuliga, og hetta kemst m.a. av, at tað dregur út við spurninginum um at takla hølis-spurningin hjá Søvnum Landsins.*

Hví minkar játtanin til søvnini hjá landinum frá 2012 til 2013? *Svar: Sparingarnar verða framdar orsakað av trongu fíggjarkørmunum á grein 7.*

Hví minkar landsstýrismaðurin játtanina til bygdasøvn, fólkabóksøvn, ljóðabókaframleiðslu, listasøvn og sjósavnið? *Svar: Sparingarnar verða framdar orsakað av trongu fíggjarkørmunum á grein 7.*

24.3.15. Hvalastøðin við Áir (Løguj.)

Hví lækkar játtanin niður í 1 mió. kr.? *Svar: Tað hevur ikki verið pláss á langtíðaríløgukørmunum til eina hægri játtan.*

Hvør er ætlanin fyri varðveitingarætlanini á 1 mió. kr. árliga komandi árini? *Svar: Í 2012 fóru Søvn Landsins undir arbeiðið at varðveita bygningarnar á hvalastøðini við Áir. Arbeitt verður eftir eini ætlan, har teir bygningarnir, ið eru í ringast standi, verða umvældir fyrst. Komandi árini heldur varðveitingararbeiðið fram. Samstundis arbeiðir ein nevnd, sett av landsstýrismanninum, við eini yvirlitsætlan fyri, hvussu hvalastøðin og økið kring hana kann verða brúkt sum savn og upplivingardepil. Á vári 2013 fyriliggur ein samlað ætlan fyri hvalastøðina og økið kring hana.*

24.4.06. Kringvarp Føroya (Rakstrarj.)

Hvørjar eru ætlanirnar at digitalisera alt savnið hjá Kringvarpi Føroya? *Svar: Orsakað av vantandi játtan hevur ikki borið til at sett ferð á digitaliseringina av savninum hjá Kringvarpi Føroya.*

Er ætlanin at gera broytingar viðvíkjandi kringvarpsgjaldinum – evt. leggja hetta inn í skattin? *Svar: Ongar ítøkiligar ætlanir fyriliggja um at broyta innkrevjingarháttin.*

Er eftirmeting gjørd av Public Service sáttmálanum? Um so er, hvør var niðurstøðan? *Svar: Eftirmeting er gjørd av fyrsta árinum (2011) við Public Service sáttmála millum Kringvarpið og Mentamálaráðið. Frágreiðingin er tøk á heimasíðuni hjá Kringvarpinum og hjá Mentamálaráðnum. Kringvarpið greiðir í innganginum frá, at ásetingarnar í public service-sáttmálanum verða fylgdar við, at fokus verður sett á skiftandi øki, soleiðis at øll øki yvir sáttmálaskeiðið verða fevnd. Mentamálaráðið ynskti, at Miðlasavnið verður tikið við í frágreiðingina næstu ferð.*

Er eftirmeting gjørd av samanleggingini av ÚF og SVF? Um so er, hvør var niðurstøðan?

Svar: Eftirmeting er ikki gjørd av samanleggingini av ÚF og SVF. Tó hevur Mentamálaráðið javnan fingið fráboðan um, at samanleggingin ikki livir upp til endamálið um betri rakstur og synergi, fyrr enn alt virksemið er savnað í Sortudíki.

Er ætlanin at útbyggja soleiðis, at Kringvarp Føroya kann húsast í felagshøli? *Svar: Málið er, at alt Kringvarpið í framtíðini skal húsast undir sama taki í Sortudíki.*

Farið er undir at kanna um til ber at selja ognirnar í M. A. Winthersgøtu og harvið útvega fígging til part av útbyggingini í Sortudíki.

24.5.01. Studningur til Kirkjugrunnin (Stuðulsj.)

Stuðulin fyri 2011 var skerdur. Hetta er tí, at mett var, at raksturin av fólkakirkjuni toldi, at stuðulin varð skerdur eitt einstakt ár. Í 2012 varð stuðulin hækkaður við 0,5 mió. kr.
Hava ætlanir ikki verið um, at hækka játtanina, soleiðis at skerjingin í 2011 varð løgd aftur á játtanina?
Svar: Jú, hesar vóru ætlanirnar. Landsstýrismaðurin skeyt av somu orsøk upp at hækka hesa játtan við 1 mió kr. í 2012. Men Fíggjarnevndin valdi tá at taka ½ mió. kr. av játtanini aftur. Tí hevur landsstýrismaðurin skotið upp somu játtan fyri 2013, hóast ynskiligt hevði verið at hækka játtanina.

24.6.16. Langhylur í Vági (Løguj.)

Hvør er støðan við hesi íløgu? *Svar: Verkætlanin er ikki góðkend enn.*
Nær væntast hon liðug? *Svar: Samb. fyrireikarunum kann byggingin byrja í november 2012, og Langhylurin kann verða liðugur á heysti 2013.*

35.1.10. Trygdarmiðstøðin (Løguj.)

Hvør er støðan viðvíkjandi hesi íløgu?
Svar: Mentamálaráðið hevur í mai 2012 gjørt avtalu við Fiskimálaráðið, at Mentamálaráðið yvirtekur byggileiðsluna og tann partin av játtanini, ið var eftir at byggja fyri. Ætlanin er, at arbeiðstakarin avhandar bygningin til Mentamálaráðið hósdagin 8. november 2012. Bygningurin er tikin í nýtslu í oktober 2012.

Hvør hevur ábyrgd av íløguni nú?
Svar: Mentamálaráðið umsitir Trygdarmiðstøðina.

38.3.07. Kringvarpssendistøðir (Rakstrarj.)

Er ætlanin at geva KVF fleiri rásir, so almennu sjónvarpsrásirnar í grannalondum okkara eisini kunnu verða sendar øllum føroyingum? *Svar: Ongar ítøkiligar ætlanir eru um hetta í løtuni.*

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Vinarliga

Mentamálaráðið

Bjørn Kalsø
landsstýrismaður

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo